


# Bilar og motorsúkklur í Bella

**Biler i Bella, ið er størsta bilaframsýning sum verður fyriskipað í Danmark, verður frá 18.-21. mars við øllum teimum nýggjastu bilunum og sum nakað nýtt - eisini motorsúkklum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Hósdagin 18. mars lata dyrnar upp til størstu donsku bilaframsýningina Biler i Bella í Bella Centrinum á Amager. Á framsýningini verður alt frá teimum nýggjastu og kvikastu sportbilunum til praktiskar familjubilar, umframt at motorsúkklur nú eisini verða sýndar fram fyri fyrstu í Biler i Bella.

Sum nakað nýtt vera kendu donsku bildesignararnir Jesper Hermann og Christian Brandt, sum tekna bilar á básinum hjá MotorMagasinet. Eisini verður ein serligur básur ið nevnist "Ny teknologi", har alt tað nýggjasta innan alternativ brennievni verður sýnt fram sum t.d. bilar sum verða drivnir við el, brint og hybridbilar.

Framsýningin Biler i Bella er opin í fýra dagar, frá hósdegnum 18. mars til og við sunnudagin 21. mars.




# MultiAir til Fiat og Chrysler

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

*Nýggjasti Fiat Punto Evo og Chrysler 300*





Týska verksmiðjan Schaeffler Group víðkar nú sítt virksemi í Norðuramerika, har teir leggja til rættis eina størri framleiðslu av heimsins fyrsta hydrauliska variabla ventilstýrisysteminum MultiAir, ið er ein framkomin skipan, sum er gjørd av Fiat Powertrain Technologies.

MultiAir framleiðslan hjá Schaeffler verður gjørd upp á lisens frá Fiat, og skal primert nýtast í nýggjastu modellunum hjá Chrysler í USA.

MultiAir skipanin, sum gevur bilinum munandi minni brennievnisnýtslu og lægri $CO_2$ útlát, verður nýtt í nýggjasta Fiat Punto Evo, sum hevur upp til 25 prosent lægri bensinnýslu enn tilsvarandi motorar við eins nógvum hestakreftum.

## Bilradio á Rás2

**Av tí at Rás2 sendir beinleiðis úr London alla hesa vikuna, er sendingin Bilradio útsett til hósdagin 25. februar kl. 16.10.**